# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Prísurin fyri samgonguna

»Tinglimir Javnaaðafloksins renna undan okkum« ljóðar boðskapurin, sum fakfelagsfólk í dag hava at bera. Orsøkin er tann sama, sum síðani byrjanina av hesum valskeiðnum hevur verið ovast á breddanum í støðuga stríðnum millum eina »modernisering« av Javnaðarflokkinum og siðvandu arbeiðararørsluna, haðani sami flokkur er sprottin.

Tað er ein óreingiligur veruleiki, at sosialdemokratarnir í orðsins upprunaliga týdningi eru um at fækkast í Javnaðarflokkinum. Ein gongd, sum eisini hevur verið sjónlig í øllum vesturheiminum, har fjarstøðan millum vinstru og høgru – tíbetur - er vorðin alt minni við árunum.

Formaður Javnaðarfloksins á tingi staðfestir, at tey renna ikki undan nøkrum fakfelag, men at tað hinvegin ikki nyttar nakað at fundast um leistin, sum skattalættin er latin eftir, tí avgerðin handan hetta er langt síðani tikin. Tað er tó undrunarvert, at sami tingmaður vaknaði sum við kaldan dreym, bara tímar eftir at samgonguskjalið var undirskrivað. Ta ferðina vóru boðini, at hetta kundi Javnaðarflokkurin á ongan hátt standa inni fyri.

Og tað er helst nakað um tað. Ein fortreyt fyri semjuni handan skattalættan var ein hækkan av inngjaldinum til samhaldsfasta. Sama inngjaldið ger, at samlaða ávirkanin av skattalættanum er millum lítil og eingin. Men har inngjaldið til samhaldsfasta rakar proportionalt til allar skattgjaldarar, gevur skattalættin meira til hægru inntøkurnar, og tí verður talan um eina skeivsnaring í samlaða gjaldinum.

Gaman í er politikkur ein støðug vigan millum fyrimunir og vansar, tá semjur verða gjørdar. Semjur, har báðir partar geva nakað. Men fyri samleikan hjá Javnaðarflokkinum er spurningurin, hvørt semjan handan samgonguskjalið var ov dýrt keypt.

**Sosialurin**

## Eg skilji ikki Sverra Midjord!

**FLÓVIN EIDESGAARD**
Vanløse 5. desember 2006



Eg havi vinfólk, sum hava fingið morðhóttan úr Føroyum, eftir at tey hava staðið fram sum samkynd uttanlands. Tað er fyri tey, eg skrivi hesa áheitan á Sverra, sum eg kenni frá tíðini eg búði á Tvøroyri.

Eina tíð hevur verið mett, at løgtingsmaðurin Sverre Midjord kanska fór at hava avgerandi atkvøðuna um uppskotið at broyta grein 266b í revsilógini, so »kynslig orientering« kemur við. Og í kvøld kom fram, at Sverre er avgerandi, um ja ella nei verður í meiriluta, tá rættarnevndin skrivar álit í málinum. Tað er væl hugsandi, at meirilutatilmælið hjá rættarnevndini kann fáa avgerandi ávirkan á teir tingmenn, sum ivast.

Eg skilji væl, at málið er trupult. Men eg skilji ikki, at ivi er fyri nakran javnaðarmann, hvat skal atkvøðast, tá avtornar! Heimssøgan prógvar, at samkynd fólk eru ein av bólkunum, sum hava brúk fyri verju. Í Føroyum vita vit øll, at í mong ár hava samkynd í stórum tali rýmt av landinum. Sverre veit líka væl sum eg, at mong onnur noyðast at krógva sína kynsligu orientering. Hetta er tekin um, at rúm er ikki fyri teimum í føroyska samfelagnum.

Ynskið um eisini at verja onnur enn samkynd, m. a. brekað í grein 266b er sympatiskt, og kann takast upp við donsku stjórnina. Men um tað verður knýtt upp í hetta málið nú og sett sum krav fyri at verja tey samkyndu, sum øll okkara grannalond longu verja, so sær Fólkatingið helst ynskið sum eina obstruktión og provokatión, og tað gagnar ikki teimum brekaðu. Umrøtt verður í Danmark at taka »aldur« við í grein 266b, tí man stúrir fyri, at nú tað gerast alt fleiri eldri fólk og m. a. við tosi um »eldrabyrðu«, fer aldursdiskrimination kanska at gerast ein vaksandi trupulleiki. Tá kunnu tey brekaðu helst fáast við í góðari tíð eftir føroyskum ynski -- um vit ikki velja at standa uttanfyri, tá talan er um tey samkyndu.

Sverre, sum hevur boðað frá at hann ikki stillar upp til næsta val, hevur ein gyltan møguleika at skriva seg inn í Føroya søgu áðrenn hann gevst í politikki. Tað kann hann gera við at gera sítt til, at Løgtingið samtykkir broytingina av grein 266b. Brúkar Sverre hinvegin ikki henda stóra møguleika, sum lyklastøðan er, so verður eftirmælið hjá javnaðarmanninum ikki gott, tað eri eg vísur í!

## Opið bræv til trímannaðu sjúkrahúsleiðsluna á Landssjúkrahúsinum

Tað er ein stór vanlukka fyri alt Føroya fólk, at ljósmøðurnar á Landssjúkrahúsinum hava sagt seg úr starvi. Undirritaðu yrkisbólkar, ið eru at rokna sum smærri yrkisbólkar í heilsuverkinum, krevja, at ovasta leiðslan á landssjúkrahúsinum gevur okkum frágreiðing í hesum sambandi. Vit vilja hava greitt at vita, hví leiðslan hevur valt ikki at lata ljósmøðrunum alla leiðsluna av barsilsøkinum.

Ljósmøðurnar hava fleiri ferðir gjørt vart við, at barsilsøkið er teirra kjarnuøki og at tær hava fullan fakligan førleika at leiða alt barsilsøkið. Tí er tað fyri okkum púra óskiljandi, at kjarnuøkið hjá ljósmøðrunum, er lagt út til annan yrkisbólk at leiða.

Vit spyrja, um hetta er avleiðing av, at eingir smærri yrkisbólkar eru í ovaru leiðslunum. Sjúkrarøktarfrøðingur er settur sum sjúkrarøktarstjóri, í depilsleiðslunum eru umframt læknar bert sjúkrarøktarfrøðingar, og nú skulu sjúkrarøktarfrøðingar eisini leiða barsilsøkið á føðideildini, ið sum áður nevnt er kjarnuøkið hjá ljósmøðrunum.

Vit átala harðliga, at yrkisbólkar í heilsuverkinum, ið eru fult førir at leiða síni øki, ikki verða settir til tess.

**Almanna- og heilsurøktarafelagið**
**Bioanalytikarafelagið**
**Ergoterapeutfelagið**
**Fysioterapeutfelag Føroya**
**Kost- og føðslufelag Føroya**
**Radiografar í Føroyum**

## Óli valevni?

**DAN R. PETERSEN**



Í gjár 4. desember boðaði Útvarpið frá, at Óli Jacobsen var uppstillaður til formansvalið í F.F.

Fyri uppstilling eru greiðar reglur: Fimm skipsmanningar ella fimm sóknarformenn skulu skriva undir uppstillingina. Lógir felagsins, sum Óli fekk samtyktar í sínari tíð siga, at mínir menn skulu lata uppstillingina inn til Ólasa umsiting.

Ólasa umsiting tekur út, hvørjir sleppa at velja. Ólasa umsiting sendir atkvøðuseðlar til veljararnar. Óli avger, nær atkvøðuseðlarnir skulu sendast út, men noktar at upplýsa mær, nær hetta verður.

Óli situr inni við, hvør sleppur at velja, men noktar mær at síggja limalistan. Fiskimenn fíggja Ólasa propagandu. Eru valevnir líkastillaði?

**Hetta er annars demokrati í Ólasa hugaheimi!**

Eg vil síggja svart upp á hvítt, um uppstillingin hjá Óla er í lagi sambært reglunum; antin í bløðunum ella í brævi. Annars meti eg hann als ikki sum valevni.

Forsetin í Hvítaruslandi sigur seg eisini vera demokrat.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.